# Vælkomin á sundalagsstevnu

**Borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu býður øllum vælkomnum á Sundalagsstevnu. Hesa seinastu, ið hildin verður í Hvalvíkar Kommunu. Næsta ár verða tvær av trimum bygdum, sum hýsa Sundalagsstevnuni, í Sunda Kommunu, og tann triðja verður í Havnar Kommunu**

STEVNA
*Edvard Joensen*

**Hvalvík:**
– Vælkomin til Hvalvíkar. Hjartaliga vælkomin á Sundalagsstevnu.

Borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu tekur í móti á kommunuskrivstovuni, sum um nakrar mánar ikki verður kommunuskrivstova í Hvalvíkar Kommunu meira.

Hetta er seinasta Sundalagsstevna, sum hildin verður, meðan Hvalvíkar Kommuna er veruleiki, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu. Umframt Hvalvík hoyrir eisini Streymnes til kommununa, eins og Nesvík ger tað.

Tað er trivnaður í kommununi, greiðir borgarstjórin frá. Í dag búgva 407 fólk í Hvalvíkar Kommunu. Tað er tað mesta, sum nakrantíð hevur verið skrásett í kommununi, sigur hann.

Kortini heldur hann tað ikki vera skeiva avgerð at hava tikið at leggja saman við hinum kommununum, sum í felag mynda kommunusamtakið, ið eftir nýggjár fer at eita Sunda Kommuna.

Heðin Zachariasen metir ikki, at Hvalvík hevur mist ella fer at missa nakað við hesi samanleggingini. Heldur hinvegin, er hann sannførdur um.

Umsitingin verður bíligari, vísir hann á, og lættari verður hjá eini kommunu við ferfaldum íbúgvaratali at gera seg galdandi á ymsum økjum, heldur hann.

Hvussu gongdin hevur verið í kommunalpolitikki seinnu árini, sigur Heðin Zachariasen, at einki kann undirstrika hesa gongdina sum júst Sundalagsstevnan.

Sundalagsstevnan byrjaði í sjeytiárunum sum ein bygdarstevna í Hvalvík. Síðan hevur hon ment seg til at gerast ein ítróttarstevna við FM kappróðri, sum hildin verður á skift í trimum bygdum. Og hesar tríggjar eru nú allar farnar frá at vera sjálvstøðugar komunur til at vera lagdar saman í og við størri eindir. Hvalvík og Hósvík ganga saman við øðrum saman í Sunda Kommunu, og Kollafjørður er farin upp í Havnar Kommunu, vísir hann á.

Tað er tó hóast alt við eitt sindur av sorgblídni, at seinasti borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu býður øllum gestum, høgum sum lágum, at vera hjartaliga vælkomin á Sundalagsstevnu í Hvalvík og Streymnesi 2004.




*Heðin Zachariasen verður tann seinasti borgarstjórin í Hvalvíkar Kommunu. Tá nýtt bygdarráð tekur við á nýggjárinum, er tað samanssett av fóki úr fleiri bygdum, sum allar eru partur av Sunda Kommunu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Neytalortar og bingo

**Summarstevnurnar eru tann stóra inntøkukeldan hjá ítróttarfeløgunum á staðnum, har stevna verður hildin. Sundalagsstevnan, sum Hvalvíkar Sóknar Róðrarfelag í ár skipar fyri, er einki undantak**

SUMMARSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Marjun Fríðálvsdóttir er formaður í Hvalvíkar Sóknar Róðrarfelag, sum er høvuðsfyrireikari av Sundalagsstevnuni, sum hildin verður í Hvalvík um vikuskiftið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hvalvík:**
Summarstevnurnar skapa hugna og vekja serligar kenslur í fólki. Men tær eru eisini í fleiri førum fíggjarliga grundarlagið undir teimum feløgum, sum skipa fyri teimum.

Sundalagsstevnan verður í ár hildin í Hvalvík, og er tað Hvalvíkar Sóknar Róðrarfelag, sum skipar fyri sjálvari stevnuni.

Tað skilst á Marjuni Fríðálvsdóttir, sum er formaður i Róðrarfelagnum, at tiltøkini, sum skipað verður fyri, eisini í rímiliga stóran mun eru slík, sum væntandi skulu geva inntøku til felagið.

Høvuðstiltakið á Sundalagsstevnuni er FM kappróðurin, ið sum vanligt verður leygardagin klokkan 15.00.

Men so eru tað onnur tiltøk, sum stevnubingo, dansur, tivoli og neytalortakapping, ið beinleiðis eru ætlað at geva inntøku til felagið, sum mynda stevnuskránna.

Men eisini mentanartiltøk, kirkjugongd og sunnudagsskúli eru við í almennu skránni fyri Sundalagsstevnuna.

Hølisviðurskiftitni í so lítlari bygd sum Hvalvík avmarkað av sær sjálvum tiltøkini, sum havast kunnu, sigur Marjun Fríðálvsdóttir, formaður í HSR, sum róðarafelagið verður nevnt.

Almenna srtevnuskráin byrjar hóskvøldið við stórum stevnubingo í Hvalvík, og heldur so fram til út á sunnudagin.

Róðrarfelagið hevur fingið til vega eitt sórt stevnutjald, sum verður sett upp í skúlagarðinum, og har verða so tiltøk sum dansur og annað undirhald, sigur Marjun Fríðálvsdóttir.

Fríggjakvøldið verða tiltøkini meira beinleiðis ætlað teimum ungu, sigur hon. Leygarkvøldið sleppa børnini upp í part, tá Trøllapætur kemur at vitja. Og seinni fara Tvøramenn at spæla til dans fyri tí tilkomna ættarliðnum, sigur hon.

Leygardagin verður eitt umfar í Grand Prix renningini fyri bæði vaksin og børn runnið í Hvalvík

Hóast sjálvur fótbóltsvøllurin er liðugur, verður eingin fótbóltur í Streymnesi kortini. Stevnudystirnir, har undir landskappingardystir hjá EB-Streymi, verða tí eisini á Sundalagsstevnuni leiktir norðuri á Eiði.

Seinnapartin sunnudagin verður kappsigling við seglum á Hvalvíkini. Bátarnir, sum luttaka, møta í bátahylinum klokkan 15.00, sigur formaðurin í HSR.

Klokkan 16.00 sunnudagin verður byrjað við ponyríðing og tivoli í skúlagarðinum.

Tá verður eisini sangløta á skúlaloftinum, har skúlabørnini fara at føra fram ymiskt, tey hava vant, bæði við sangi og tónleiki.

Til skemtunar verður eisini skipað fyri togtogan millum streymnesmenn og hvalvíkingar. Togast verður tvørtur um ánna niðanvert brúnna við skúlan. Og ætlandi skal haldast á, til annar parturin er farin í ánna.

Sunnudagin verður eisini tann afturvendandi neytalotakappingin, sum plagar at vera á Sundalagsstevnu í Hvalvík.

Sundalagsstevnan verður sett í leygardagin klokkan 14.00 av Heidi Petersen, løgtingskvinnu í Norðurstreymoy. Beint aftan á verður so FM kappróðurin.

Klokkan 23.00 um kvøldið fara fólk aftur at savnast til felagssang, kórsang, midnáttarrøðu og fýrverk. Á hesi midnáttarsamkomuni fer Sundalagskórið at syngja, og Heðin Zachariasen, borgarstjóri og løgtingsmaður, fer at halda midnáttarrøðuna.

Sunnudagn á middegi verður guðstænasta í Hvalvíkar Kirkju, har Inga Poulsen Dam, prestur, fer at prædika. Klokkan hálvgum trý verður sunnudagsskúli á vanligum stað, siga tey, sum skipa fyri Sundalagsstevnuni í ár.

# Avtaka kommunu í menning

**Hvalvíkar Kommuna er ein kommuna í menning. Kortini verður hon tikin av á nýggjárinum. Men tann avtøkan fer helst at vera við til at menna økið upp aftur meira, heldur seinasti borgarstjórin í Hvalvík**

KOMMUNUTÍÐINDI
*Edvard Joensen*

**Hvalvík:**
Tað sprettur og grør í Hvalvíkar Kommunu. Fólkatalið er vaksandi. Bygt er og verður til bæði tann yngra og eldra endan. Og eisini til tey í miðjuni er nógv byggilendi klárt, og fleiri hús eru ávegis.

Góð gróðrarlíkindi eru fyri felagslívinum, sum hoyrir frítíðini til, so her sær út til at vera eitt liviligt stað.

Og kortini verður Hvalvíkar Kommuna ikki at finna á kortinum um eitt gott hálvt ár.

Fólk í Hvalvíkar Kommunu hava arbeiði, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri. Hóast tað hoyrist um ábendingar til lækkandi konjunktur í samfelagnum, er hetta ikki nakað, fólk í Hvalvíkar Kommunu merkja, sigur hann.

Fyri tann, sum feðrast gjøgnum bygdirnar, ella fyri tað mesta uttan fyri tær, kann tykjast, sum her er reiðiliga deytt, tá hugsað verður um arbeiðspláss.

Og tað er í grudnini ikki einki um tað, tí tað traditionella flakavirkið, sum er lívæðrin í so mongum føroyskum bygdum, er ikki í Hvalvík.

Hinvegin er stóra sniðhúsavirkið Norðsetur í Hvalvík. Eisini er fóðurgoymslan hjá Skretting á havnarlagnum, eins og OK Heilsøla, sum kanska er tann, sum í løtuni er tann leiðandi gravimaskinsølan í landinum, á havnarlagnum í Hvalvík, vísir Heðin Zachariasen á.

Men hann ásannar, at meginparturin av fólkinum í Hvalvík og Streymnesi kortini fer aðrastðani at arbeiða um daganrnar.

– Kanska er júst tað tann stóra styrkin hjá okkum, heldur hann. Fólk eru ikki, sum so mangastaðni, miðsavnað á einum arbeiðsplássi, men spjadd víða. Kemur so hóttafall á, merkist tað ikki so ógvusligt, sum tað ger, har kanska eini 60-70 prosent av arbeiðsmegini í bygdini verður rakt samstundis, sigur hann.

Hvalvík liggur væl fyri geografiskt, og tað er ein grund til, at fólk velja at seta búgv her, sigur Heðin Zacariasen. Eisini fólk, sum annars ikki hava tilknýti til bygdirnar.

Men eina aðra ógvuliga týðandi orsøk heldur hann vera góðu møguleikarnar fyri barnaansing í kommununi.

Hvalvíkar Kommuna hevur spildurnýgjan dagstovn, sum hýsir bæði vøggustovu- og barnagarðsbørnum, eins og frítíðarskúli eisini er í Hvalvík. Bíðilisti er eingin og tað ger uttan iva, at ungfólk velja at búseta seg her, sigur borgarstjórin. Tí ein sannroynd er, at tá fólk spyrja eftir grundstykkjum, spyrja tey eisini í sama andadrátti eftir barnaansingarmøguleikum.

– Vit kunnu siga teimum, at teir eru góðir her hjá okkum, og millum annað tí velja tey at seta seg niður her.

Byggiøkið er gott og, 28 grundstykki er gjørd klár í Streymnesi. Í Hvalvík eru harumframt umleið 10 stykki tøk.

Tað standa seks hús í gerð í kommununi, og heili 14 stykki eru seld. Fleiri eru eisini útgrivin.

Hvalvíkar skúli er frá 1962. Hann lýkur ikki øll tey krøv, nýggja skúlalógin ásetir, so har skulu ábøtur gerast, sigur borgarstjórin.

Í dag ganga 49 næmingar í barnaskúlanum í Hvalvík. Lærararnir eru fimm í tali. Tá børnini fara í framhaldsdeildina fara tey i Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Og tá so fólk eru komin í ovara endan á stiganum, verður eisini pláss fyri teimum í Hvalvíkar Kommunu.

Kommunurnar hava tikið seg saman um at byggja eitt ellisheim í Streymnesi.

Talan verður um eitt heim við plíssi til 32 búfólk, sum væntandi fer at kosta einar 37 miliónir krónur, sigur Heðin Zachariasen.

Av hesum kostnaði ber landið tær16 miliónirnar, og so skulu kommunurnar sjálvar klára restina.

Eftir ætlan skal ellisheimið í Norðurstreymoy standa klárt í mei 2006, sigur Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu.



*Hvalvíkar Kommuna hevur góðar ansingarumstøður til yngra ættarliðið. Eingin bíðilisti er, og tað er eisini við til at fáa fólk at flyta til Hvalvíkar, sigur borgarstjórin*

*Mynd. Álvur Haraldsen*

# Hálvt kúfóður undir plastikki

**Tann ivaleyst størsti fótbóltsvøllurin í landinum í dag er júst liðugur í Streymnesi. Men enn verður landskappingin spæld á Eiði, tískiftingarrúm mangla í Streymnesi**

FRÍTÍÐ
*Edvard Joensen*



*Nýggjasti og helst størsti fótbóltsvøllurin í landinum er tann í Streymnesi. Hann kann kortini ikki nýtast til kappingar sum er, tí einki góðkent skiftingarrúm er við vøllin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Streymnes:**
Hóas teir kláraðu at fáa sjálvan graslíkisvøllin í Streymnesi lidnan til Sundalagsstevnuna, verður eingin stevnudystur spældur har kortini.

Reglurnar eru strangar, og av tí, at næsta hús við líkinda skiftingarmøguleikum er Felagsskúlin á Oyrarbakka, verður eingin fótbóltur á vøllinum í Streymnesi. So einføld eru boðini.

Hvalvíkar Kommuna hevur júst fingið lagt graslíki, sum er til víddar sum eitt gott hálvt kúfóður, á fótbóltsvølin innan fyri innastu húsini í Streymnesi.

Sjálvur vøllurin er 7.668 fermetrar til víddar. Tað er 120 ferðir 71 metrar til longdar og breiddar, og við økinum rundan um er samlaða víddin 8.520 fermetrar.

Vøllurin kostar higartil einar tvær milliónir krónur, sum kommunan hevur goldið.

Tað næsta, sum nú liggur fyri í hesum sambandi er at fáa bygt eitt góðkent hús við fótbóltsvøllin, so hann eisini kann brúkast til landskappingar.

Tað verður sum vera man mest hugsað um felags fótbóltsliðið EB-Streym í hesum sambandi.

Men allur ítóttur, sum knýttur er at Hvalvík og Streymnesi, er ikki fótbóltur kortini.

Ítróttarfelagið Streymur er eisini kent fyri annað enn fótbólt. Serliga hava tey gjørt seg galdandi á høgum støði í borðtenniskappingunum bæði her á landi og eisini við umboðum uttanlands, eitt nú á Oyggjaleikum.

Og stoltleiki teirra her á víkini man uttan iva vera Róðrarfelagið, sum við sínum bátum, serliga Hvessingi, hevur vunnið nógvar sigrar til bygdirnar.